STARVSLÝSING




# Laborantur til kemisku kanningarstovuna

FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

**Vit søkja eftir laboranti til avloysarastarv at byrja skjótast møguligt.**

Starvið fevnir um kemiskar kanningar innan matvøru- og umhvørvisøkið. Serliga er talan um kanningar av matvørum, drekkivatni, spillivatni, svimjihylsvatni og jørð. Starvið fevnir eisini um sýnistøku innan virkisøkið hjá deildini. Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum.

*Fleiri upplýsingar síggjast á www.hfs.fo.*

**Útbúgving og royndir**
Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur.

Tað er ein fyrimunur at hava royndir innan kemiskt kanningarstovuarbeiði og at hava kunnleika til góðskustýring og EDV á brúkarastøði. Somuleiðis er tað ein fyrimunur at hava koyrikort.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Starvið er fulla tíð. Setanin er fyribils til 1. juli 2008.

Lønin verður í 4. flokki sambært sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum, sí sáttmála og lønartalvu á heimasíðuni hjá Lønardeildini, www.lnd.fo.

**Umsóknin**
Umsóknir til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin hin 26. oktober 2007.

**Um kemisku kanningarstovuna**
Í løtuni eru 5 laborantar og ein akademikari í føstum starvi.

Kanningarstovan er altjóða góðkend eftir DS/EN ISO/IEC 17025 og er undir eftirliti av DANAK (Dansk akkreditering), sí www.danak.dk.

Kanningarstovan er ein vælvirkandi deild, har starvsfólki dagliga strembar eftir dygdargóðum avriki og einum góðum arbeiðsumhvørvi.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Rikke Berg Larsen, deildarleiðara, tel 35 64 00 ella á www.hfs.fo.

***Lýsingin sæst eisini á www.hfs.fo.***

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 356 400
Fax +298 356 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

Starvslýsing

Heimatænastan

# Leiðari til á Sýnini, Miðvágur

**Starvið sum leiðari á Sýnini verður hervið lýst leyst. Í løtuni verður arbeitt við at umskipa eldraøkið í Vágum, tí er neyðugt, at setti leiðarin á Sýnini er opin fyri, at setanarstað og ábyrgdarøki kann broytast.**

Ert tú ein ígongdsetari, torir at ganga nýggjar leiðir, er fleksibul og opin fyri nýggjum avbjóðingum, er tað tær, vit hava brúk fyri.

Tað eru 36 búfólk og .45 fulltíðar starvsfólk á Sýnini. Harafturat hevur heimið dagtilhald fyri heimabúgvandi pensjónistar.

**Vit vænta av tær, at tú:**
- Hevur útbúgving og autorisatión sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Hevur hollar royndir innan eldraøkið
- Hug og hegni at fyrisita og leiða
- Hevur evni at samstarva við búfólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- Hevur telduførleika á brúkarastøði.

**Sum leiðari hevur tú ábyrgdina av:**
- Dagligu leiðsluni og fakligu ábyrgdina av veittum tænastum.
- At leiða, stuðla og menna starvsfólkið
- At búfólkaeindirnar virka í samsvar við hugtakið "Eden Alternativ"
- At virkað verður innan givnar fíggjarkarmar.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt dynamiskt og fjølbroytt starv
- Eitt jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvið
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Fakliga og persónliga menning.

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Løn- og setanarviðurskifti er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Starvið er áramálsett til 5 ár.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eiley Weihe, stýrisforkvinnu á tlf. 255657.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

Stýrið fyri á Sýnini
Kálvalíðvegur
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 26. oktober 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Atlantic Brokers Ltd

Stál línuskipið GULLBERG



er til sølu - **við loyvum.**
Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Atlantic Brokers**
tel.: 312238 / 212238
sc@atlantic-brokers.com
www.atlantic-brokers.com